WWW.BST.FO

# Festi leyst í Svínoy

Við heimild í § 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð lýsir Búnaðarstovan við hesum niðanfyri nevnda festi leyst:

- Matr. nr. 87a, vídd 171.857 fermetrar innangarðs
- Matr. nr. 155a uttangarðs, einbýttur hagi Uppi í Grønu, 2 merkur og 12 gyllin
- Matr. nr. 155b uttangarðs, 3 merkur í felagshaga Fyri Handan Fjøll (sum íalt er 4 merkur).

Samstundis verða, við heimild í § 6 í løgtingslóg um landsjørð, og treytað av neyðugari fíggjarlógarheimild, niðanfyri nevndu føstu ognir, sum standa á festinum, lýstar til sølu, við hóskandi undirlendi. Ognirnar verða seldar persóni, sum lýkur treytirnar at taka við festinum, og sum hevur hægsta boð. Búnaðarstovan tilskilar sær rætt til ikki at selja ognirnar saman við festinum, um hóskandi boð ikki verður fingið. Harafturat verður frábýtingarkostnaðurin at gjalda av festaranum. Boð undir 1 mió. hava ongan áhugað.

Keypspeningurin fyri ognirnar verður at rinda kontant við yvirtøku av festinum. Umsøkjari skal tí verða til reiðar at skjalprógva, at hann hevur neyðuga figging.

Persónar, sum lúka treytirnar til jarðarbrúkskunnleika sambært § 2 í kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð, og sum kunnu lúka treytirnar um bústaðarskyldu sambært § 5 í løgtingslóg um landsjørð, kunnu søkja um festið.

**Føstu ognirnar á festinum eru:**
- Fjós á Eiðinum
  - Fóðurhøll við fjósið
  - 3 súrhoysbrunnar,
  - Køstur
- Seyðahús á Eiðinum
- Seyðahús uppi í Viðurbyrgi
- Sethús á Eiðinum

Omanfyri nevndu føstu ognir verða, sambært § 11 stk. 8 í løgtingslóg um landsjørð, knýttar at rakstrinum á festinum. Hetta er tó ikki galdandi fyri sethúsini á Eiðinum.

Aðrar fastar ognir eru á festinum, sum ikki eru fevndar av hesi lýsing.

Nærri upplýsingar um festið og føstu ognirnar kunnu fáast við at venda sær til Búnaðarstovuna, tlf. 47 90 00.

Umsóknir um festið saman við tilboði uppá føstu ognirnar skulu vera send Búnaðarstovuni innan 25. november 2009.

BÚNAÐARSTOVAN
Frammi í Dali 166 • 410 Kollafjørður
tlf. 47 90 00 • fax 47 90 20 • bst@bst.fo



# Tvingsilssøla av skipi

**Týsdagin tann 8. desember 2009, kl. 9:45** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir fiskiskipið VENUS I, kallibókstavir XPZN, BRT 343 og NRT 102.

Skipið er bygt í 1961 í Noregi. Skipið er skrásett sum heimahoyrandi í Miðvági. Eigari av skipinum er P/F Vest-Line

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn týsdagin, tann 17. november 2009 kl. 9:45, og verður tann, ið metir seg at hava veð ella onnur rættindi í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260** (sak nr. 3990902), sum kann geva nærri upplýsingar um skipi og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-41/2009).

**Føroya Fútarættur,**
**Tann 16/10-2009**



# Tvingsilssøla av skipi

**Týsdagin tann 8. desember 2009, kl. 10:15** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir fiskiskipið WEST FREEZER, kallibókstavir XPZJ, BRT 395 og NRT 120.

Skipið er bygt í 1961 í Noregi. Skipið er skrásett sum heimahoyrandi í Miðvági. Eigari av skipinum er Sp/f KG 476.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn týsdagin, tann 17. november 2009 kl. 10:15, og verður tann, ið metir seg at hava veð ella onnur rættindi í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260** (sak nr. 3990902), sum kann geva nærri upplýsingar um skipi og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-40/2009).

**Føroya Fútarættur,**
**Tann 16/10-2009**





GUTBROD slágimaskina til sølu fyri kr. 6.000,-. maskinan er í góðum standi.

**Áhuga kunnu ringja á 220528**





*Silas leitar eftir familju*

Silas er ein golden retriever blanding, hann er 5 ár, sera blíður og aktivur.

Hevur tú at geva Silas nýtt heim?

Ring 50 45 33

www.dvf.fo

Lýsing er stuðlað av Sosialinum

DJÓRAVERNDARFELAGIÐ



# Árasaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Føroya Psykiatrifelag verður mikudagin 25. november á Hotel Hafnia kl. 08.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

***Nevndin***



# JØRÐ Í FROÐBA

Vegna Føroya Skiftirætt verða hesir ognarlutir lýstir til sølu:

1/6 av matr. nr. 834, Froðba, samlað vídd av ognini 871 m²

¼ av matr. nr. 832a, Froðba, samlað vídd av ognini 1.362 m²

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatvirkið**

Skansavegur 1 · Postsmoga 85
110 Tórshavn · Tlf. 31 21 71



**Veitst tú eina góða?**

**Ring til Sosialin tlf 341800**







LEATHERMAN

LANDSHANDILIN

www.landshandilin.fo
Akranesgøta 11
FO-100 Tórshavn
Telefon 311385



# **Íverksetanarstudningur** til listafólk í 2010

Mentanargrunnur Landsins kann lata listafólkum íverksetanarstudning við støði í listaligum og fakligum metingum.

Íverksetanarstudningur skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum, serliga ungum, at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði. Studningurin kann nýtast til tilfar, leigu av atelieri, námsferðir o.l.

Íverksetanarstudningurin er kr. 75.000 árliga og kann í mesta lagi latast sama persóni í 2 ár.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi týsdagin 15. desember 2009.**

**Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni ella á skrivstovuni.**

**Mentanargrunnur Landsins**

Tórgarðsgøta 42 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 · Fax 31 19 98
mentan@mentanargrunnur.fo
www.mentanargrunnur.fo